Diabetesfelagið

Hoyringarskriv til Løgtingsins Trivnaðarnevnd

Fyrst vilja vit takka fyri, at Trivnaðarnevndin hevur boðið Diabetesfelagnum at koma við hoyringarsvari til lógaruppskotini, sum koma at raka okkara limir. Vit halda, eins og okkara meginfelag, Megd, at landsstýrið átti at gjørt sær størri ómak við at skipa hoyringar, áðrenn lógaruppskot verða løgd fyri løgtingið.

Hoyringarsvar:

Løgtingsmál 31/2020: Uppskot um broyting um løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Tað er at fegnast um, at Føroyar, sum hava bundið seg til at halda altjóða breksáttmálan, hava eina góða og nútímans skipan um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum integrerar fólk, ið bera brek á arbeiðsmarknaðin.

Diabetesfelagið vil staðiliga ávara ímóti at niðurlaga vælferðarskipanir, sum eru fyri veiku borgararnar í landinum, og vit vilja minna á, at verandi kostnaður fyri hesa góðu skipan er ein lítil brotpartur av samlaðu lønarútgjaldingunum, sum vóru nakað meira enn 10 milliardir krónur í fjør.

Eisini er felagið ímóti, at landsstýrið ætlar, at fólk við skerdum arbeiðsførleika ikki longur skulu hava rætt til sáttmálaløn. Hetta er ein grundleggjandi rættur, sum fleiri hava havt í sínum virki, áðrenn tey hava mist part av arbeiðsførleikanum, og hetta eigur framhaldandi at vera ein rættur, sum harafturat er ein góð og einføld skipan at javna lønarískoytið. Tá starvsfelagarnir fáa lønarhækkan, standa hini ikki eftir.

Tað hevur avgerandi týdning fyri borgarar at kenna seg javnmett við onnur. Tað gevur lívskvalitet at arbeiða saman við øðrum og á jøvnum formligum føti, hóast niðursettan arbeiðsførleika.

Diabetesfelagið heldur ikki, at vit eiga ikki at fremja hesar broytingar, sum raka hart, fyri bara at spara eina lítla millión krónur.

Løgtingsmál 32/2020 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

Diabetesfelagið ávarar myndugleikarnar um, at gera skipanir verri fyri fólk við kroniskum sjúkum at fáa fótafesti á arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrið skrivar sjálvt, at ein avleiðing av uppskotinum kann verða, at arbeiðsgevarar fara at afftra seg at seta fólk við sjúku í starv. Hetta eigur ikki at vera gjørt.

Løgtingsmál 33/2020 Broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a (lestrarstuðul frádrigin fyritiðarpensjón)

Diabetesfelagið hevur onga viðmerking til lógaruppskotið.

Løgtingsmál 34/2020 Broyting í løgtingslóg um javningarprosenttil almannaveitingar

Diabetesfelagið heldur, at almannaveitingar eiga at verða javnaðar eftir fastari og gjøgnumskygdari skipan og fylgja lønargongdini á arbeiðsmarknaðinum

Diabetesfelagið

Løgtingsmál 35/2020 Broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd

Hetta uppskotið kann verða til óbótaligan skaða fyri fólk við diabetes og onnur við kroniskum sjúkum, sum tørva nógvan heilivág og eigur undir ongum umstøðum at verða samtykt.

At økja um gjaldið hjá okkara limum til Heilsutrygd við 0,1 prosenti av skattskyldugu inntøkuni og samstundis økja egingjaldið fyri heilivág við upp til 80 prosent, er óðamannaverk.

Síðani uppskotið bleiv alment, hevur Diabetesfelagið ávarað um, at láglønt fólk við diabetes kunnu fara at skamta sín heilivág, og at hetta fer at hava stórar heilsuligar bágar við sær og eisini stóran kostnað seinni vegna seinfylgjur. Lívsgóðskan verður skalað bæði nú og seinni. Somuleiðis hava fólk við diabetes gjørt vart við seg og greitt frá, at sum nú er, er tað ein stór fíggjarlig byrða at hava diabetes, og at tað mangan er svárt at hava ráð at rinda fyri sín heilivág.

Vegna nevndina í Diabetesfelagnum

May-Britt Skoradal, forkvinna